STUTT SAGT

Sparikassin:

# Rentan til sethúsalán hækkar mest

**Føroya Sparikassi hækkar nú rentuna. Størstu byrðuna fáa sethúsaeigarar, sum nú skulu rinda 0,4% meira. Rentan hækkar úr 4,05 upp í 4,45**

BÚSKAPAUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Sparikassi hækkaði nú rentuna á lánum við skiftandi rentu til hækkaða rentustigið, eftir at Tjóðbankin hevur hækkað leiðandi rentuna. Rentan á innláni upp á uppsøgn og flestu útlán hækka við 0,25 prosentum. Bústaðarlán hækka tó við 0,40 prosentum úr 4,05 upp í 4,45 prosent p.a.

Realkredittlán verða ikki ávirkað av hesi rentubroyting

– Tjóðbankin hevur enn eina ferð hækkað sína leiðandi rentu, og eftir seinastu rentuhækkingina tann 4. august, lagar Sparikassin nú sínar rentur til hækkaða rentustigið, sigur Føroya Sparikassi í tíðindaskrivi.

Við virknaði frá 17. august 2006 fer lægsta bústaðarrentan úr 4,05 upp í 4,45 prosent p. a. Aðrar útlánsrentur hækka í megin-regluni 0,25 prosent. Flestar innlánsrentur hækka við 0,25 prosentum, og tað ber m. a. í sær, at rentan á kontu við 3. mðr. uppsøgn, kapitalpensión, lutapensión og á bústaðarkontu hækka tilsvarandi.

Rentan á vanligum innláni uttan uppsøgn verður óbroytt. Tey, ið higartil hava fingið Realkredittlán, verða ikki ávirkað av broytingini.

# Løgmaður og grønlendski landsstýrisformaðurin havt fund

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Hans Enoksen, landsstýrisformaður hava á almennu vitjan løgmans í Ilulissat í døgunum 11.- 15. august 2006 umrøtt ymisk mál av felags áhuga.**

ALMENN VITJAN

Frá føroyskari síðu varð kunnað um m. a. Hoyvíkssáttmálan frá 2005 millum Føroyar og Ísland, ið fevnir um frælsi fyri vørur, tænastur, kapital og persónar o.a. umframt spurningin um limaskap í Norðurlandaráðnum.

Frá grønlanskari síðu varð kunnað um eitt nú fíggjarlógaruppskotið og bygnaðarbroytingar í høvuðsheitum.

Báðir partar fegnast um aftur í ár at hava gjørt avtalu fyri 2006 til sínámillum fiskivinnusáttmálan frá 1997 millum Føroyar og Grønland. Viðvíkjandi kongafiskakvotum í Irmingarhavinum vóna báðir partar, at ein loysn verður funnin í samráðingunum, sum longu fara fram.



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Hans Enoksen, landsstýrisformaður í Grønlandi fegnaðust undir almennu vitjan løgmans í Grønlandi m. a. um sínámillum fiskivinnusátmálan*

Løgmaður og landsstýrisformaðurin fegnast harumframt, at samráðingarnar um ein fríhandilssáttmála millum Føroyar og Grønland nú kunnu byrja. Teir vóna báðir, at sáttmálin kann verða liðugt samráddur og undirritaður av løgmanni og landstýrismanninum fyri fíggjar- og uttanríkismál innan árið 2006 er liðið.

Á fundinum avgjørdu partarnir at seta ein embætismannabólk, sum fær til uppgávu at greina og ítøkuliggera samstarvsmót innan fiskivinnu, mentan, útbúgving o.a. umframt spurningin um at seta á stovn konsulatskipanir í báðum londum.

Greiningararbeiðið verður væntandi sett í gongd skjótast gjørligt við tí endamáli at undirrita ein sáttmála á almennu vitjanini hjá landsstýrisformanninum í Føroyum í juni mánaði 2007.

# Klaksvíkin er fiskivinnubýur burturav

**– Vit ætla gera Føroya Sjómannadag uppaftur størri við eitt nú at knýta eina fiskivinnuframsýning aftrat degnum, altjóða fyrilestrar, seminar og framsýningar av ymiskum slagi, siga fyrireikararnir**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av Føroya Sjómannadegi halda, at føroyingar í minsta lagi einaferð um árið eiga at seta sjóvinnufólk og sjóvinnuna annars í hásæti – og tí eigur ein sjómannadagur sum hesin at seta sær stór mál, sum teir taka til.

– Vit eru eitt lítið land, og vit hava livað av tí, sum havið gevur. Vit hava altíð sett okkara álit á fiskivinnuna. Skulu vit verða við í teirri kapping sum er, mugu vit ikki smæðast burtur á altjóða pallinum, men alla tíðina seta okkum stór mál.

Í Klaksvík hava tey ætlanir um at gera Føroya Sjómannadag enn størri, enn hann er í dag.

– Vit ætla okkum at knýta eina fiskivinnuframsýning aftrat degnum, altjóða fyrilestrar, seminar og framsýningar av ymiskum slagi.

Fyrireikararnir vísa á, at føroyingar, sum starvast innan fiskivinnuna, ferðast nógv út í heim at kunna seg um viðurskiftini har.

– Men vit halda tað vera líka so umráðandi, at vit regluliga skipa fyri tiltøkum, sum kunnu hava við sær, at útlendingar koma higar at kunna seg um tað, sum vit eru bestir til. Vit liggja væl fyri í Atlantshavinum millum sterkar fiskivinnutjóðir. Tí átti tað at borið til at skipað Føroyar sum ein miðdepil, tá ið ræður um kunning um fiskivinnu og vinnur, sum tengdar eru at henni.

Lagt verður aftrat, at einki annað land er so tengt at fiskivinnuni sum Føroyar.

– Og tá ið so Klaksvíkin er fiskivinnubýur burtur av, halda vit tað vera rætt, at vit her taka lógvatak saman við øðrum og halda Føroya Sjómannadag her norðuri, siga fyrireikararnir.



*– Tað átti at borið til at skipað Føroyar sum ein miðdepil, tá ið ræður um kunning um fiskivinnu og vinnur, sum tengdar eru at henni, halda fyrireikararnir av Føroya Sjómannadegi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*